**Um endurgjaldskrav og sektarsamtykt**

- Hevur ein kommuna verið fyri einum fíggjarligum missi orsakað av einari tiknari avgerð, kann endurgjaldskrav koma upp á tal.
- Tað er landsstýrismaðurin, ið má saksøkja einstøku kommunustýrislimirnar persónliga eftir endurgjaldi fyri tapsgevandi avgerðir, tiknar av kommunustýrinum.
- Vanligar endurgjaldsrættarligar reglur eru galdandi, t.e. at ikki einhvør fíggjarligur missur kann elva til endurgjaldskrav.
- Bara handilsliga óforsvarlig tiltøk koma undir endurgjaldsábyrgd. Ábyrgd kann eisini staðfestast, um formligar reglur ikki eru fylgdar.
- Málið kann verða loyst við sektarsamtykt heldur enn endurgjaldskravi. Hetta er serliga, um tað eftir umstøðunum hevði verið órímiliga tyngjandi at kravt fult endurgjald frá teimum, ið hava ábyrgdina.